

*Á hvítusunnu vóru 38 mans við teimum báðum sluppunum, Westward Ho og Jóhonnu, á einum túri til Kirkwall, Orknoyggjar. Teir sluppu at royna sjólívið, uppliva Orknoyggjar og ikki minst at njóta einastandi samanhalið umborð á sluppunum*

# Sluppferð til Orknoyggjarnar á hvítusunnu



*Skiparanir báðir, Frants í Líðini og Niels Gullbein, práta saman*

**Mikukvøldið í farnu viku løgdu sluppirnar báðar, Jóhanna og Westward Ho, til havs. Leiðin gekk til Kirkwall í Orknoyggjunum, og menn fingu høvi at uppliva Orknoyggjarnar og at royna sjólívið umborð á báðum sluppum okkara**

SLUPPTÚRUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mikukvøldið 29. juni stóðu knappliga 30 mans í Álakeri og gleddu seg sum smábørn. Allir vóru teir umborð á slupppini Westward Ho, og klárir at mynstra.

Klokkan átta fór sluppin av Havnini við kós ímóti Vági, har helvtin av manningini fór Jóhonnu, sum kom aftrat. Síðani settu sluppirnar báðar beina kós ímóti Kirkwall í Orknoyggjunum.

Hans Pauli Larsen av Oyrarbakka hevur verið við árliga túrinum seks ferðir, og hann gleðir seg líka nógv hvørjaferð hann skal avstað:

– Hvør túrur eg havi verið á er nakað heilt serligt, og tað ber ikki til at taka dagar ímillum, hvør túrur nú hevur verið tann besti. Men í ár var tað nakað heilt serligt, við tað at bæði Jóhanna og Westwward Ho fóru, sigur Hans Pauli.

Westward Ho hevur gjørt Orknoyggjatúrin í nógv ár, men hetta var fyrsta ferðin, at Jóhanna var við. Men sambært Hans Paula, so varð túrurin bara uppaftur betri av tí sama.

– At síggja eina slupp á víðopum havi, tað er ein fantastisk sjón. Og tann møguleikan at síggja eina aðra slupp hevur tú ikki, tá tað bara er ein á túrinum. Eisini samanblandingin av norðoyingum og suðuroyingum riggaði einastandi, greiðir Hans Pauli Larsen frá.

Per Skov hevur skipað fyri slupptúrinum í fleiri ár nú, og hann greiðir frá, at tað var ongin trupulleiki at mannar sluppirnar.

– Seinast vit fóru túrin máttu vit brúka Jóhonnu, tí Westward Ho var løgd. Men Jóhanna tekur fleiri mans enn Westward Ho, og tí rendu vit okkum í ein trupulleika tá 21 vildu sleppa við aftur í ár og Westward Ho bara tekur 16. Men tann trupulleikan loystu vit at fáa Jóhonnu við á túrin eisini, so vit vóru tvær sluppir í staðin fyri ein.

Ferðin gekk skjótt, lotið var fríkst og seglini munaðu væl. 20 tímar brúktu tey um at koma niður millum oyggjarnar, men so var tað, at Jóhanna fekk motorskaða og mátt hjálpast inn. Men á miðdegi fríggjadag lógu teir við bryggju i Kirkwall. Fleiri umboð fyri lokalu fjølmiðlarnar stóðu fyri teimum, tá teir komu, men henda dagin byrjaðu teir flestu við at fáa sær eitt hart tiltrongt brúsubað á einum sonevndum Sailor